VALGREINAR

# 50% TALA - 50% OYRA = 100%

**Nita Næs**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



Vit hava demokrati í Føroyum. Demokrati merkir fólkaræði. Ì hesum landinum skulu vit øll hava ræði. Tað eru vit, sum hava ræði - ikki eg ella tú - men vit. Ein fortreyt fyri at VIT kunnu taka avgerðir í hesum landi er, at VIT kunnu samarbeiða.

Ì einum valstríði snýr tað seg eisini um persónar. Tí snýr tað seg eisini um tann einstaka persónin.Um nakar velur t.d. at velja meg inn á ting, so mugu tey eisini krevja av mær, at eg kann samarbeiða. Eg skal ikki koma inn á ting og halda, at øll hini eru býtt, tí tey umboða hinar býttu flokkarnar. Eg má harafturímóti duga at sígga, hvat hinir flokkarnir duga væl - og eg má eisini duga at tora at hava ta meining, at onkur av hinum flokkunum dugir okkurt betur enn Javnaðarflokkinum.

Og hetta tori eg so sanniliga. Kanska nógv undrast á hetta. Men hesin mín hugburður kemur ikki av ongum. Tað liggja tvær sannføringar aftanfyri:

1. Hóast tað, at eg haldi, at eg havi góð politisk mál, so skuldi tað verið ótrúligt, um eg ikki eisini helt, at onnur sjálvsagt hava eins góð politisk mál í sínum tonkum.
2. Javnaðarflokkurin byggir sína skrá á menniskajvirði, á samband millum menniskju .À, at vit skulu hava tað gott alt lívsskeið okkara á fold. At vit skulu vera nakað fyri onnur.

Gott val øll somul.

# Tekniska Skúla í Havn gjørdu teir einki fyri

**Annfinn Brekkstein**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Eftir at hava kannað viðurskiftini hjá Tekniska Skúla í Havn, eri eg komin til ta niðurstøðu, at eingin politiskur vilji hevur verið hjá fráfarnu samgongu at loysa upp fyri teimum vánaligu umstøðum hjá skúlanum.

Sambandsflokkurin legði fram uppskot á ting um millum annað at byggja nýggjan tekniska skúla í Havn, og var hetta eitt klokkuklárt uppskot við fíggingarmøguleikum og øllum. Sum sjálvsognarstovnur hevði skúlin møguleikar at útvega fígging sjálvur.

Tá uppskotið kom fyri tingið, var bert tjóðveldisflokkurin ímóti. Men sum fráleið linkaðu fólkafloksmen í kongunum, av tí at trýstið frá tjóðveldsiflokkinum var so stórt, og samgongan skuldi jú bjargast fyri einhvønn prís.

Tað er bara Sambandsflokkurin, sum vísir ábyrgd fyri Tekniska Skúla í Havn. Fyri vinnuna hevur ein tíðarhóskandi tekniskur skúli sera stóran týdning, eitt nú um vit skulu hava okkara ungdóm útbúnan til tíðarinnar krøv frá vinnuni.

Við at skapa góðar karmar, fært tú ein góðan skúla, og tað hevur skúlin uppiborið. Tey, sum arbeiða á skúlanum, hava fleiri ferðir víst á at skúlan er ikki tíðarhóskandi og hølisviðurskiftini ikki nøktandi. Men tey tosa fyri deyvum oyrum.

Sambandsflokkurin sleppur ikki endanum, men fer at leggja alla orku í at fáa tekniska skúlanum í Havn tíðarhóskandi umstøður at virka undir.

# Tað eru úrslitini, ið telja

**Ása Olsen**
*valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy*



Málvíst og sakligt arbeiði, á einum virðiligum støði, er tað, ið hevur verið við til at geva bæði okkum sum felag og annars øllum eldraøkinum, ein stóran bata.

Fyri at nevna nøkur mál, so eru nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar eitt úrslit av málvísum arbeiði, saman við sakligum samráðingum við avvarðandi myndugleikar.

Uppskúling til heilsuhjálpara, har heimahjálparar kunnu nema sær uppskúling til heilsuhjálpara við løn. Í skrivandi løtu hava 76 heimahjálparar nomið sær hesa uppskúling, og eru aðrar 20 undir uppskúling, og hevur hettar sjálvandi lyft alla eldrarøktina upp á eitt nógv hægri støði. Afturat hesum eru higartil tveir flokkar av eitt árs næmingum liðugir, meðan tann triði flokkurin er á veg, alt nakað, ið lyftir alt øki upp.

Heima- og heilsuhjálparar hava fingið eina sera góða eftirlønarskipan, bæði fyri fastlønt og fyri tímalønt starvsfólk, har arbeiðsgevarin rindar alla eftirlønina, eisini nakað, ið okkara eldru limir longu nú fáa ágóðan av. Nú fáa allir limir felagsins eftirløn, tá teir fara frá vegna aldur.

Hettar er bert ein lítil partur av tí, ið vit sum felag hava verið við til at fáa uppá pláss fyri okkara limir.

Tann tíðin, tá gomul og sjúk vóru send til hús á náttartíð, orsakað av verkføllum á eldraøkinum er av.

Tað eru ivaleyst tey, ið sakna tann spenningin, ið tílíkur arbeiðsháttur førdi við sær, men sum felag við 450 limum, ið allir starvast innan eldraøkið, hava vit onki ynski um, at seta tey gomlu í eina líknandi støðu, men hava vit allar størstu virðing og umsorgan fyri teimum.

# Okur krevja okra rætt

**Otto West**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Okur Suðringar eru troyttir av at hoyra, nú hava tit fingið níggjan Smyril, níggja ferjulegu, næstan eina tunell (berghol) millum Hov Øravík, djúphavn í Vági og eg veit ikki hvat.

Nei vit hava onki fingið, hettar er okkara rættur sum partur av hesum landi, vit hava sanniliga goldi okkara part av køkuni, og eiga sjálvandi part í samfelagságóðum, eiga ikki at liggja á knæ fyri at fáa okkara part.

Blokkstuðul og aðrir ágóðar sum falla í okkara lut, við at vera partur av danska ríkinum, er eingin álmussa, nei hettar er okkara rætur, líka so gott sum tær íløgur, ið lagdar verða niður í Suðuroy og trúgvi eg ikki, at nakar føroyingur vil kalla hesar fyri olmussu.

Nei vit skulu krevja okkara rætt, bæði sum Suðringar og Føroyingar

Hettar gert tú bara við at velja ein sterkan sambandsflokk á ting.

# Eldraøkið ein íløga - ikki ein útreiðsla 2

**Jón Ellendersen**
*Valevni Sjálstýrisfloksins í Eysturoy*



**Meiri pening og fleiri starvsfólk til røktarheimini:**
Seinastu útmeldingarnar frá starvsfólkinum á røktar- og ellisheimum kring landið er, at teimum vantar orku, og tað vil siga, meiri pening, so tey kunnu geva teimum gomlu annað enn bert vask og alraneyðugastu røktina.

Vit hava ábyrgd av, at okkara eldru hava møguleikar fyri einum ríkum lívi, eisini tá tey eru flutt á røktarheim. Lívskvaliteturin eigur at vera sum hægstur; møguleikarnir hjá teimum eldri, sjálvi at velja hvat tey vilja nýta dagin til eiga at gerast fleiri og betri, og tað skal vera møguligt hjá teimum at fylgja við í tí, sum hendir í samfelagnum, eisini menningini.

"Ude af syn, ude af sind"! ljóðar eitt danskt orðatak, og hetta man mangan vera galdandi tá tað kemur til tey gomlu í samfelagnum, ikki bert tí danska, men so sanniliga eisini tí føroyska. Men sektin liggur ikki so nógv á familjuni sum á landsins myndugleikum, tí tað eru jú frá teimum játtanirnar skulu koma.

Ístaðin fyri, at játtaninar vaksa so at røktin batnar og starvsfólkið hevur møguleikar at geva teimum gomlu meiri enn bert "vask og røkt", so minka játtaninar, hóast tað, at undanfarna landsstýri hevur avsett nógvan pening til eldraøkið. Orsøkin er einføld: lønarhækkingar og príshækkingar hava etið peningin upp.

Malan Johansen sigur í grein sínari: "Eg vil búgva í einum vælferðarsamfelag" at: Tú kann meta um eitt vælferðarsamfelag, við at hyggja at, hvussu samfelagið fer við teimum veikastu. Og hyggja vit at føroyska samfelagnum, so er ikki væl statt.

Tað sum eg havi ilt við at skilja, og foreina meg við er, at summir politikarar og leiðarar í almennu fyrisitingini ikki hugsa um tey gomlu sum menniskju, men sum tøl, eitt mál. Vita tey ikki, at ein dag er tað teirra túrur. Munna tey tá fara at gleðast um sínar egnu raðfestingar? Neyvan!

Sjálvstýrisflokkurin vil:
- at eisini tey gomlu fáa lut í menningini
- at tey gomlu hava eins høgan lívskvalitet sum restin av fólkinum
- at tey gomlu kunnu liva í tryggleika, hvønn dag
- at tey gomlu kunnu gleðast um, at eftirkomandi ættarlið taka sær væl av teimum
- at tey gomlu ikki skulu gerast biddarar men krúnan í samfelagnum

Tí vil Sjálvstýrisflokkurin:
- avseta meiri pening til eldrarøktina
- fáa fleiri fólk í arbeiði á røktarheimunum
- gera møguleikarnar hjá teimum eldru, sjálvi at velja, betri

Tey gomlu duga sjálvi at hugsa og vita, hvat teimum tørvar. Ella sum Lasse Klein einaferð hevur sagt: Tey gomlu eru gomul nokk at sjálvi at velja!

Og minst til:
- At gerast gamal er eingin sjúka el
- At gerast gamal er eingin skomm
- At gerast gamal er krúnan á lívsverkinum

X við D = demokratisk rættindi fyri tey gomlu



VALGREINAR

# Rættleiðing til Julian

**Gerhard Lognberg**
*Løgtingsmaður og valevni fyri Javnaðarflokkin í Sandoyar valdømi*



Eg bleiv rættiliga skakkur, tá ið eg læs grein í bløðunum tann 08 januar 2004. Jú gamaní yvirskriftin var flot, men verði eg kortini noyddur, at koma við rættleiðingum, innihaldinum viðvíkjandi.

Tú skrivar, at vit sum hava umboðað Sandoynna á tingi seinasta valskeið, einki hava gjørt fyri at fáa Teistan, at sigla seinni á kvøldi.

Her fer tú, so púra skeivur, og kunnu øll, í hava hug til tess, fara inn á heimasíðuna hjá løgtinginum og síggja hvussu ofta eg havi rópt hart!, men Julian góði, **tíni egnu hoyrdu ikki!**

Eg skal her vísa til eitt brot úr málinum, sum var reist á tingi av mær sjálvum og Rúna Hentze:

Løgtingsmál nr. 114/ 2002 Uppskot til samtyktar, um ferðasamband í Sandoy.
*"….Harafturat ger tað lítla fólkagrundarlagi, at ikki er grundarlag fyri, miðnáms- og hægri útbúgvingum, fjølbroyttum kvøldskúlatilboðum, mentanar- og frítíðartilboðum. Ein stórur partur av hesum tørvi kundi verið nøktaður, um ferðasambandið var betri, t.v.s. um ferjan sigldi longur út á kvøldið…".*

Hetta uppskot hevði drúgva viðgerð í tinginum. Tú kann eisini fara inn á heimasíðuna hjá løgtinginum og hoyra mína røðu hesum viðvíkjandi. Eg kann vísa á, at eg eisini setti fyrispurningar um hetta sama mál bæði, 22 januar- og 16 januar 2003.

Til tína misnøgd um sambandi við bussarnar á gomlurætt, og í Skopun, kann eg bara siga, at eg eri púra samdur við tær, og havi eg eisini rópt hart, um hesi vánaligu viðurskifti. Saman við løgtingsumboðunum og borgarstjórunum fyri Sandoynna, havi eg stríðst fyri, at betra um busskoyringina í oynni, men viðurskiftini eru langt frá nøktandi. Niðurstøðan má verða tann, at ov líti av peningi verður játta til Strandferðsluna, í øllum førðum, kann ein siga, at samgongan, hevur sovi í tímanum, hvat ferðasambandinum til og í Sandoynni viðvíkur.

Men góði tú, soleiðis hevur gongdin verði í hesum málum, og at fólk eru ósamd ella klandrast, jú tað gongur mangan harliga fyri seg í tinginum, og í politikki sum heild. Ein og hvør berjist fyri síni hugsan.

Eg kendi bara, at tað var neyðugt at rætta hesa misskiljing og vísa á, hvat eg havi gjørt hesum málum viðvíkjandi, meðan eg havi sitið í anstøðu. Annars, alt tað besta í valstríðnum.

# Einskiljing av føroyskum fyritøkum

**Bjarki Mohr**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



Hvussu - og hví - skulu vit fara undir at einskilja fyritøkur.

Vit hava í nógv ár hoyrt ymsar røddir viðgerða hvørt vit skulu einskilja (privatisera) almennar fyritøkur. Higartil í valstríðnum hevur viðgerðin av málinum verið rík uppá politiskar markeringar, men tilsvarandi fátæk hvat viðvíkur sakligum og fruktagóðum viðmerkingum.

Sigast má, at tað er rættuliga ørkymlandi at fylgja privatiseringsgongdini. Føroya Landstýri er vorðin ognari av fleiri av teim vinnurekandi fyritøkunum. Teir eru vornir ognarar, meira av neyð enn huga.

Vit hava nú haft eitt longri tíðarskeið við fíggjarligum vøkstri. Fleiri av teim alment áttu fyritøkunum hava klára seg val, og er tað útlit til, at Føroya Landstýri við einum nøktandi úrsliti, kann sleppa sær av við nakrar av fyritøkunum. Tó er onki ið bendir á, at man politiskt megnar at finna fram til eina gongda leið.

Ein heppin privatisering, av teim alment áttu fyritøkunum, forútsetur, eftir mínum tykki, eina breiða politiska viðgerð í Løgtinginum. Viðgerðin eigur at enda við einari heimild til Føroya Landstýri. Ein heimild, ið er í trá við tað Løgtingið kann semjast um. Men Føroya Løgting eigur at binda seg til eina semju, ið røkkur langt útum komandi valskeið. Tað vil verða sera óheppi, um man leggur eina tilvildarliga kós, ið verður broytt fjóra hvørt ár. Ella oftari. Tað vil verða beinleiðis skaðiligt, skal man gerða sær vónir um at selja nakrar av almennu fyritøkunum, sum eisini má roknast við, kemur at taka drúgva tíð.

Og so eigur man at seta niður eitt privatiseringsráð við víðum heimildum. Ráðið skal, við tilvísing til Føroya Landstýri, og við virðing fyri teim politisku rætningslinjum ið Føroya Løgting hevur viðtikið, hava ábyrgdina av at selja tær fyritøkur man kan semjast um. Í eitt tílíkt ráð, eigur man at velja best egnaðu fólkini, ið vit yvirhøvur kunnu finna. Í Føroyum, og - um neyðugt - eisini uttan fyri Føroyar. Royndir við privatisering, og sølu av stórum fyritøkum er, - av góðum grundum - ein mangulvøra her heima á klettunum. Og eg vil staðiliga ávara ímóti teirri trúgv, at ein virðisbrævamarknaður - sum tann ósjónliga hondin, ið vit kenna so væl frá teim økonomisku teoriunum - vil loysa allar hesar trupulleikar.

Og so eigur man, sjálvsagt, at taka nevnd og stjórn í almennu fyritøkunum, við uppá ráð. Alt annað átti at verið undrunarvert. Tann leiðslan, ið Føroya Landsstýri hevur litið upp í hendurnar dagliga raksturin av almennu fyritøkuni, er vónandi ein nærlagdur ráðgevi fyri eigarin, um so er, at man veruliga ætlar at selja fyritøkuna.

Spurningurin um hví vit skulu privatisera nakrar av almennu fyritøkunum kann fyri nógv tykjast torskiltur - og tí eisini ræðandi - tá hesar eru lutfalsliga væl riknar seinastu árini.

 Eg vil gera eina roynd at varpa ljós á nakrar fyrimunir við einari privati-sering - ikki av hugsjónar-ligum grundum, men av praktiskum grundum - ið kann geva evni til umhugsunar.

Í kreppuárunum fór Landsstýri inn við almennum peningi og bjargaði harvið stóran part av privatu vinnuni. Sostatt hava vit øll goldið einaferð fyri vinnuna, og eru samstundis eigarar av hesari. Við eigaraskapinum fylgjir eisini ein vandi - vandin fyri at missa allan peningin - um vinnan aftur fer av knóranum.

Um vit innan hava fingið ein størri skara av privatum íleggjarum, hava vit fingið afturrinda tann pening vit hava sett í orsakað av kreppuni. Vit hava eisini spjat vandan, og tí minka tapið hjá landinum.

Gerst tað nú neyðugt - enn einaferð - at fara inn við almennum peningi til tess at bjarga vinnuni, so hava vit, hóast alt, fingið peningin aftur fyri fyrstu bjargingina, og koma tí ikki at gjalda tvær ferðir fyri somu vøruna.

Tí er tað avgjørt vert at umhugsa eina skilagóða privatisering. Men henda skal gerast við umhugsni - og skal taka tað tíð, ið er neyðug - soleiðis at vit øll fáa sum mest burturúr.

# Álit og rættartrygd á arbeiðsmarknaðinum

**Bergur P. Dam**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*
*- tað sterka C'ið*



Fakfeløgini mugu hava rættartrygd og medávirkan í tíðini, sum kemur. Mongu sakarmálini, har Landsstýrið hevur tapt, prógva at so hevur ukki verið.

Í rúma tíð hava fakfeløg verið fyri ágangi frá landsins stýrið. Ferð eftir ferð hava fakfeløg og teirra umboð víst á, at myndugleikarnir ikki virða rættindini hjá fakfelagsrørsluni. Tað hevur verið mestsum ein regla, at landsstýrið hevur roynt at kroyst avgerðir niður yvir arbeiðsmarknaðin, uttan fyrst at finna undirtøku frá pørtunum.

**Fiskimannafelagið**
Føroya Fiskimannafelag hevur verið í eini røð av sakarmálum við Fiskimálaráðið, har felagið fyri tað mesta hevur vunnið. Tað tykist sum Landsstýrið við ljós og lykt hevur leitað eftir møguleikum at umtulka lógarverkið fyri at sleppa undan sjálvsøgdum skyldum.

Dømi um hetta er sjúkratryggingarmálið hjá eygleiðarum á rækjuskipum. Fiskimálaráðið vildi ikki viðurkenna, at eygleiðarar - hóast teir vóru mynstraðir eftir somu treytin sum restin av manningini - áttu rætt til sjúkraviðbót.

Føroya Rættur dømdi Fiskimálaráðið at tapa og staðfesti, at Fiskimannafelagið hevði rætt í uppáhaldi sínum, at eygleiðarar hava fullan rætt til sjúkraviðbót.

Í FF blaðnum er hetta mál væl og virðiliga lýst. Niðurstøðan er at "øll møgulig og uppfunnin ivamál hava verið tulkað til skaða fyri borgaran". Somuleiðis vísir hetta mál, at fyrisiting og málsviðgerð hava verið merkt av tilvild, vantandi skjalprógvan og politiseran.

**Ársverkið**
Annað dømi um vánaliga handalagið - ja beinleiðis bonsku framferðina - hjá fráfarandi samgongu, er málið um ásetaninar av arbeiðstíðarviðurskiftinum hjá lærarunum í fólkaskúlanum, tað sonevnda ársverkið.

Málið snýr seg um grundleggjandi broyting av, hvussu arbeiðstíðirnar í fólkaskúlanum verða ásettar. Avleiðingarnar av slíkari umleggjan merkjast í øllum skúlanum - í arbeiðsuppgávunum, arbeiðstíðini og í lønini hjá lærarum.

Tað bar ikki til at røkka eini semju millum partarnar. Ein uratkvøðugreiðsla millum limirnar í lærarafelagnum feldi dyggiliga tað uppskot, sum lá á borðinum. Men hóast hetta kroysti landsstýrismaðurin skipanina niður yvir lærararnar og skúlan. Avleiðingarnar eru millum annað, at lærarar, samstundis sum teimum er álagt meirarbeiði, eru farnir fleiri túsund krónur niður í løn.

Also - við eini umsitingarligari fráboðan, einum dekreti, fremur landsstýrismaðurin - Høgni Hoydal - grundleggjandi broytingar í arbeiðs- og lønarkorunum hjá lærarunum. Av sonnum eitt groft álop á rættartrygdina hjá einum starvsbólki.

**Her má vend koma í**
Javnaðarflokkurin fer í eini komandi samgongu at leggja doyðin á at byggja upp gott álit millum politiska myndugleikan og felagsskapirnar á arbeiðsmarknaðinum. Fyrisitingin skal verða eyðkend av virðing fyri eisini hesum týdningarmiklu tættunum í demokratisku skipanini.

Við at velja Javnaðarflokkin sterkan á ting eru vit við í uppbyggingini av einum føroyskum rættarsamfelag.

Eisini rættartrygdini tørvar C-vitaminir.